gult6 cyan6 magenta6 svart6



## SAMFELAG & POLITIKKUR



*Høgni Hoydal, landsstýrismaður, afturvísir pástandinum hjá Kára Petersen, búskaparfrøðingi, um at sjálvstýrissamtyktin ikki hongur saman. Tað snýr seg bara um, hvørt vit hava álit á, at búskapurin veksur, ella um vit halda, at hann fer at standa í stað, sigur Høgni Hoydal*

Høgni Hoydal, landsstýrismaður:

# Sjálvstýrissamtyktin hongur væl saman

**Sjálvt um vit fáa eina nýggja búskaparkreppu í Føroyum, hongur sjálvstýrissamtyktin saman, bert útreiðslurnar hjá landskassanum ikki vaksa. Heldur búskaparvøksturin fram, kunnu vit eisini økja útreiðslurnar, staðfestir Høgni Hoydal, landsstýrismaður**

SJÁLVSTÝRIS-SAMTYKTIN
*John Johannessen*

Tað liggur eitt langt og drúgt fyrireikingararbeiði afttan fyri samtyktina um sjálvstýri Føroya fólks.

Hetta staðfestir Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, og vísir aftur pástandunum frá Kára Petersen, búskaparfrøðingi, um at hendan koyriætlan fram móti sjálvberandi búskapi og føroyskum fullveldi ikki hongur saman.

Kári Petersen gjørdi í Sosialinum í gjár greitt, at rakstrarútreiðslur landskassans als ikki mugu økjast komandi árini, skulu vit hava ein sjálvberandi búskap innan 2015. Samstundis vísti hann á, at rakstrarútreiðslurnar eru øktar fimm prosent um árið seinastu trý árini undir sitandi samgongu.

### Skeivur logikkur

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum er tó alt annað enn samdur við búskaparfrøðinginum.

– Um ein búskaparfrøðingur nú sigur, at vit ongantíð skulu kunna klára okkum uttan danskan studning, kann tað ikki vera eitt búskaparligt úttalilsi, men eitt politiskt, sum gongur út frá, at vit fáa studning í allar ævir. Hansara útrokningar byggja jú á, at inntøkurnar steðga upp, meðan útreiðslurnar vaksa eins nógv. Og tá kann einki land klára eina tillaging, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal heldur, at útrokningarnar hjá Kára Petersen minna eitt sindur um Erasmus Montanus logikk. Tað var hann, ið segði: »Ein steinur kann ikki flúgva. Kona mín kann ikki flúgva. Altso er kona mín ein steinur«.

– Í útrokningunum hjá Kára Petersen verður sagt. Vit klára okkum ikki uttan blokkstuðul. Vit minka blokkstuðulin og klára ikki at tillaga okkum. Altso klára vit okkum ikki uttan blokkstuðul, samanber Høgni Hoydal.

Landsstýrismaðurin vísir í hesum sambandi á, at tað ber til at gera júst somu útrokningar, sum Kári Petersen hevur gjørt um sjálvstýrisuppskotið, fyri eitt og hvørt samfelag. Hann hugsar eitt dømi, har inntøkurnar hjá Danmark minka. Men samstundis klára danir ikki at minka meira um útreiðslurnar. Tískil hongur tað ikki saman, og Danmark má taka lán ella fara á heysin.

### Nógv forarbeiði

Kári Petersen, búskaparfrøðingur, segði í Sosialinum í gjár, at sitandi landsstýri, sum áður hevur gjørt kunningarherferðir um fullveldisætlanina, higartil ikki hevur viljað, dugað ella torað at gjørt eina útrokning av, hvørjar fylgjur nýggja fullveldisætlanin fer at fáa og leggja ætlanina fyri Føroya fólk. Tí hevur hann av sínum eintingum gjørt sær tann ómak at gera slíka útrokning.

Men heldur ikki hesum er Høgni Hoydal samdur við.

– Landsstýrið hevur gjørt alt sítt forarbeiði nú í trý ár við grundarlag í arbeiðinum hjá einum stórum tali av føroyskum búskaparfrøðingum. Samtyktin á løgtingi byggir á hetta forarbeiðið, sum er væl og virðiliga upplýst kring alt Føroya land, sigur Høgni Hoydal.

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum vísir eisini á, at tilmælini í Hvítubók eru fylgd. Hvítabók sigur, at neyðugt er við eini tillagingartíð, har rikin verður ein varin og ábyrgdarfullur fíggjar- og búskaparpolitikkur. Tað krevur, at landskassin ikki brúkar meira pening, enn búskaparvøksturin annars loyvir. Altso, at almennu útreiðslurnar ikki vaksa eins skjótt og búskapurin sum heild veksur. Harvið verður ein partur av búskaparvøkstrinum brúktur til at viga upp fyri minkandi blokkstuðuli.

– Hetta hava vit eisini gjørt hesi seinastu trý árini. Búskaparvøksturin hevur verið sera stórur, men landskassaútreiðslurnar eru ikki vaksnar eins nógv, og er tí eitt stórt yvirskot. Hetta yvirskot er tó enn ikki eins stórt og blokkstuðulin, vísir Høgni Hoydal á.

Løgtingið hevur í sjálvstýrissamtyktini samtykt, at blokkstuðulin skal burtur, og at tað, sum eftir er, verður sett í Búskapargrunnin, sum síðani rindar landskassanum eina rímiliga skiftistíð við minkandi gjøldum.

### Tvær metingar

Og hvussu hetta mál kann røkkast, hevur landsstýrið gjørt sínar metingar av.

Tá uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks varð viðgjørt í uttanlandsnevndini, gjørdi landsstýrið tvær metingar av gongdini.

Onnur metingin byggir á, at vit komandi árini fáa eina kreppu, har búskaparvøksturin fellur, og síðani veksur búskapurin minni, enn hann søguliga hevur gjørt frá 1962 til 1998.

Hin metingin byggir á, at búskaparvøksturin heldur fram eina tíð afturat.

– Eftir fyrru metingini verður kravið, at landskassaútreiðslurnar ikki vaksa. So hongur tað heila saman. Meðan tað eftir seinnu metingini eisini verður rúm fyri vøkstri í almennu útreiðslunum, ger Høgni Hoydal greitt.

Í hesum sambandi spyrja vit Høgna Hoydal, um tað so verður rúm fyri stóru íløgunum, sum til dømis nýggjum suðuroyarskipi, nýggjum landssjúkrahúsi og øðrum, sum samgongan hevur lovað.

– Íløguætlanirnar hjá landsstýrinum byggja ikki á ein vaksandi búskap. Bæði suðuroyarskip, Landssjúkrahús og annað, sum landsstýrið hevur raðfest, byggir á ein íløgukarm, sum ikki veksur, ger Høgni Hoydal greitt.

– Samanumtikið snýr alt seg um, hvørt vit hava álit á, at føroyski búskapurin eisini frameftir fer at vaksa eins nógv og hann hevur gjørt í miðal frá 1962 til 1998. Ella vit halda, at føroyski búskapurin fer at standa í stað. Halda vit, at føroyski búskapurin fer at standa í stað, so er bert eitt at gera hjá teimum, sum koma við slíkum hugburði. Tað er at fara til Danmarkar at biðja um meira pengar, fyri at halda støðið í Føroyum, sigur Høgni Hoydal.

**Inntøkumeting fyri 2001, samanborin við landsroknskapin 2000**
Fíggjarmálastýrið, MS, 16. Apríl 2001

| Virkisøki | Høvuðskonto (1.000 kr.) | Rokns. 2000 | Meting 2001 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|
| **20:50:01** | **Rentur av landsins skuld** | **213.248** | **205.309** | **-3,7** |
| **20:50:02** | **Millumverandi við DNB og Landsbankan** | **86.782** | **117.000** | **34,8** |
| **20:52:01** | **Skattainntøkur** | **1.310.057** | **1.470.000** | **12,2** |
| **20:52:02** | **Avgjøld og tollur** | **1.185.861** | **1.259.800** | **6,2** |
| **20:52:03** | **Ymsar inntøkur** | **88.515** | **83.867** | **-5,3** |
| | 20.52.3.01. Útluting úr Fíggingargrunninum frá 1992 | 64.625 | 80.787 | 25,0 |
| | 20.52.3.10. Aðrar inntøkur | 23.890 | 3.080 | -87,1 |
| **20:52:05** | **Flyting frá øðrum greinum** | **69.239** | **72.000** | **4,0** |
| **20:54:01** | **Heildarveiting o.t.** | **972.856** | **995.956** | **2,4** |
| | 20.54.1.01.01 Heildarveiting | 958.800 | 981.900 | 2,4 |
| | 20.54.1.01.02 Endurgjald, læraraeftirløn | 14.056 | 14.056 | 0,0 |

| Inntøkur landskassans í 2000 og 2001 (1.000 kr.) | Rokns. 2000 | Meting 2001 | Munur í % |
|---|---|---|---|
| Rentur | -126.466 | -88.309 | -30,2 |
| Skattir og avgjøld | 2.426.679 | 2.657.800 | 9,5 |
| Ymsar inntøkur | 88.515 | 83.867 | -5,3 |
| Heildarveiting o.t. | 972.856 | 995.956 | 2,4 |
| **Inntøkur tilsamans** | **3.361.584** | **3.649.314** | **8,6** |

| Til Framskrivingarark | | |
|---|---|---|
| Skattir og avgjøld | 2.465 | 2.675 |
| Rentuútreiðslur | -213 | -205 |
| Rentuinntøkur og DNB | 87 | 117 |
| Útluting frá Fíggingargrunni | 65 | 81 |
| Heildarveiting | 959 | 982 |
| **§ 20 í alt** | 3.362 | 3.649 |

gult7 cyan7 magenta7 svart7



## SAMFELAG & POLITIKKUR

**Kravsgreining viðv. tillaging av landskassanum**
Tillaging er framd, tá ið RL-úrslit áðrenn heildar- ella skiftisveigin er í javnvág í 2016

Roknskapartøl

Mett tøl fyri 2001 pr 16 apr 01

Meting frá fíggjarmálast‡ri vi›v. §20 pr. 11. apr.01. Í postinum "Skattir og avgj." er írokna› endurgj. vi›v. lærarapensiónum

**Landskassin**

| (mió. kr.) | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattir, avgjøld oa. | 2.465 | 2.675 | 2.835 | 2.949 | 3.008 | 3.068 | 3.191 | 3.318 | 3.451 | 3.589 | 3.733 | 3.882 | 4.037 | 4.199 | 4.367 | 4.541 | 4.723 |
| Rentuútreiðslur | -213 | -205 | -252 | -238 | -224 | -212 | -202 | -196 | -189 | -183 | -177 | -172 | -167 | -162 | -160 | -159 | -157 |
| Rentuinntøkur og DNB | 87 | 117 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 |
| Útluting frá Fíggingargrunni | 65 | 81 | 66 | 67 | 69 | 70 | 71 | 73 | 74 | 76 | 77 | 79 | 80 | 82 | 84 | 85 | 87 |
| Heildarveiting | 959 | 982 | | | | | | | | | | | | | | | |
| Skiftisveiting frá Búskapargrunni | | | 700 | 650 | 600 | 550 | 500 | 450 | 400 | 350 | 300 | 250 | 200 | 150 | 100 | 50 | 0 |
| **Inntøkur tilsamans (§20)** | **3.362** | **3.650** | **3.434** | **3.513** | **3.538** | **3.561** | **3.645** | **3.730** | **3.821** | **3.917** | **4.018** | **4.124** | **4.236** | **4.354** | **4.475** | **4.603** | **4.738** |
| Rakstrarútreiðslur | 2.584 | 2.860 | 2.917 | 2.976 | 3.035 | 3.096 | 3.158 | 3.221 | 3.311 | 3.404 | 3.499 | 3.597 | 3.698 | 3.801 | 3.908 | 4.017 | 4.130 |
| Yvirtøkur | | | 88 | 88 | 93 | 93 | 168 | 171 | 176 | 181 | 186 | 191 | 197 | 263 | 274 | 284 | 296 |
| Løguútreiðslur | 176 | 198 | 202 | 206 | 210 | 214 | 219 | 223 | 229 | 236 | 242 | 249 | 256 | 263 | 271 | 278 | 286 |
| **Útreiðslur tilsamans (§1-10)** | **2.760** | **3.058** | **3.207** | **3.270** | **3.338** | **3.403** | **3.544** | **3.615** | **3.716** | **3.820** | **3.927** | **4.037** | **4.150** | **4.327** | **4.452** | **4.579** | **4.711** |
| **Rakstrar og løguúrslit** | **602** | **592** | **227** | **243** | **199** | **158** | **100** | **115** | **104** | **96** | **90** | **86** | **85** | **27** | **23** | **24** | **26** |
| RL-úrslit í % av BTÚ | | | 2,4% | 2,4% | 2,0% | 1,5% | 0,9% | 1,0% | 0,9% | 0,8% | 0,7% | 0,7% | 0,6% | 0,2% | 0,2% | 0,2% | 0,2% |
| RL-úrslit áðrenn skiftisveiting í % av BTÚ | | | -4,9% | -4,1% | -3,9% | -3,8% | -3,7% | -3,0% | -2,5% | -2,1% | -1,7% | -1,2% | -0,8% | -0,9% | -0,5% | -0,2% | 0,2% |

Upphæddir vi›v. málsøkjum uttanfyri heildarveiting eru frá yvirliti í fíggjarlóg fyri 2002.

DNB, tvs. partur av yvirskoti frá nationalbankanum er 25m árliga. Rentuinntøkur eru 4% av verandi gjaldføri upp á 1200m. Gjaldførisbroytingar frá rakstri vi› tilhoyrandi rentum eru rokna›ar í árligari broyting av bruttoskuld.

Mett út frá tølum á fíggjarlóg, gongd fyrstu 3 m› í 2001 umframt útlitum vi›v. lønarsamrá›ingum v.m.

Í framskriving ver›ur rokna› vi› 6% pa av rentuberandi skuld. Skuld ver›ur framskriva› vi› stø›i í skuldini ult 2001 + /- úrslit á rakstri einstøku árini.

**Búskapargrunnur Føroya**

| (mió. kr.) | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarogn við ársbyrjan | 1.000 | 950 | 898 | 842 | 784 | 724 | 660 | 593 | 523 | 449 | 371 | 290 | 154 | 62 | 15 |
| Rentuinntøkur (5% p.a.) | 50 | 48 | 45 | 42 | 39 | 36 | 33 | 30 | 26 | 22 | 19 | 14 | 8 | 3 | 1 |
| Privatiseringar | | | | | | | | | | | | | | | |
| Kolvetnisinntøkur | | | | | | | | | | | | | | | |
| Heildarveiting | 600 | 550 | 500 | 450 | 400 | 350 | 300 | 250 | 200 | 150 | 100 | | 0 | 0 | 0 |
| Skiftisveiting til landskassan | -700 | -650 | -600 | -550 | -500 | -450 | -400 | -350 | -300 | -250 | -200 | -150 | -100 | -50 | 0 |
| Fíggjarogn við ársenda | 950 | 898 | 842 | 784 | 724 | 660 | 593 | 523 | 449 | 371 | 290 | 154 | 62 | 15 | 16 |

Skiftisveitingar til landskassan kosta grunninum íalt 5,25 mia kr.

500m rentufrítt lán ikki írokna›

Almen bruttoskuld ver›ur í EU rokna› sum bruttoskuld - gjaldføri í sentralbankum

Flutt yvirskotsgjaldføri í landsbankanum ult. 2001. Í landsbankanum standa hereftireftir gó›ar 1200m, sum tøkt konjunkturgjaldføri

**Tjóðarúrtøka og landskassaskuld**

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tjóðarúrtøka(BTÚ) | 9.020 | 9.561 | 9.944 | 10.143 | 10.345 | 10.759 | 11.190 | 11.637 | 12.103 | 12.587 | 13.090 | 13.614 | 14.158 | 14.725 | 15.314 | 15.926 |
| **Tjóðarúrtøka, vøkstur nominelt í %** | 10,0% | 6,0% | 4,0% | 2,0% | 2,0% | 4,0% | 4,0% | 4,0% | 4,0% | 4,0% | 4,0% | 4,0% | 4,0% | 4,0% | 4,0% | 4,0% |
| Inflatión | 4,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% |
| Tjóðarúrtøka, vøkstur realt í % | 6,0% | 4,0% | 2,0% | 0,0% | 0,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% |
| **Útreiðsluvøkstur í %** | | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,8% | 2,8% | 2,8% | 2,8% | 2,8% | 2,8% | 2,8% | 2,8% | 2,8% |
| Bruttoskuld við árslok | 4.200 | 3.973 | 3.730 | 3.530 | 3.372 | 3.272 | 3.157 | 3.053 | 2.956 | 2.866 | 2.780 | 2.694 | 2.668 | 2.645 | 2.621 | 2.595 |
| Bruttoskuld í % av BTÚ (EU-reglur) | 33,3% | 29,0% | 25,4% | 23,0% | 21,0% | 19,3% | 17,5% | 15,9% | 14,5% | 13,2% | 12,1% | 11,0% | 10,4% | 9,8% | 9,3% | 8,8% |

**Fyritreytir:**
Stóri BTÚ-vøksturin seinnu árini verða í framskrivingini minkaður í einki eftir 2 árum. Hendan kreppan (lágkonjunkturur) stendur við í 2 ár. Hereftir verður roknað við vøkstri, ið liggur um 1% lægri enn miðalvøkstur fyri árini 1962-2000.
Skatta- og avgjaldsinntøkur 2001-2016: Sami vøkstur sum BTÚ

Innt. grunn: Heildarveiting uppá 600m í 2002, síðan minkandi við 50m árliga fram til 2012
Løgu- og rakstrarútreiðslur: 0 % realvøkstur fyrstu 6 árini, síðan útvíð 1% realvøkstur.

**Framskriving av landskassa og búskapargrunni**
**Scenario við framhaldandi stórum búskaparvøkstri í 4 á; hereftir vøkstur = søguligur vøkstur - _%**
Jonhard Eliasen 17. apr. 2001

**Landskassin**

| (mió. kr.) | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattir, avgjøld oa. | 2.465 | 2.675 | 2.916 | 3.178 | 3.432 | 3.707 | 3.866 | 4.033 | 4.206 | 4.387 | 4.575 | 4.772 | 4.977 | 5.191 | 5.415 | 5.648 | 5.890 |
| Rentuútreiðslur | -213 | -205 | -252 | -238 | -218 | -194 | -163 | -138 | -115 | -93 | -73 | -56 | -40 | -26 | -17 | -11 | -7 |
| Rentuinntøkur og DNB | 87 | 117 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 |
| Útluting frá Fíggingargrunni | 65 | 81 | 66 | 67 | 69 | 70 | 71 | 73 | 74 | 76 | 77 | 79 | 80 | 82 | 84 | 85 | 87 |
| Heildarveiting | 959 | 982 | | | | | | | | | | | | | | | |
| Skiftisveiting frá Búskapargrunni | | | 700 | 650 | 600 | 550 | 500 | 450 | 400 | 350 | 300 | 250 | 200 | 150 | 100 | 50 | 0 |
| **Inntøkur tilsamans (§20)** | **3.362** | **3.650** | **3.515** | **3.743** | **3.968** | **4.218** | **4.359** | **4.502** | **4.650** | **4.804** | **4.964** | **5.130** | **5.303** | **5.482** | **5.666** | **5.857** | **6.055** |
| Rakstrarútreiðslur | 2.584 | 2.860 | 2.983 | 3.111 | 3.245 | 3.385 | 3.530 | 3.682 | 3.840 | 4.005 | 4.178 | 4.357 | 4.545 | 4.740 | 4.944 | 5.156 | 5.378 |
| Yvirtøkur | | | 88 | 88 | 93 | 93 | 168 | 175 | 183 | 191 | 199 | 207 | 216 | 263 | 274 | 284 | 296 |
| Løguútreiðslur | 176 | 198 | 207 | 215 | 225 | 234 | 244 | 255 | 266 | 277 | 289 | 302 | 315 | 328 | 342 | 357 | 372 |
| **Útreiðslur tilsamans (§1-10)** | **2.760** | **3.058** | **3.277** | **3.415** | **3.563** | **3.712** | **3.942** | **4.112** | **4.289** | **4.473** | **4.666** | **4.866** | **5.075** | **5.331** | **5.560** | **5.797** | **6.046** |
| **Rakstrar og løguúrslit** | **602** | **592** | **237** | **328** | **405** | **506** | **417** | **390** | **361** | **331** | **299** | **264** | **228** | **151** | **106** | **60** | **9** |
| RL-úrslit í % av BTÚ | | | 2,4% | 3,1% | 3,5% | 4,0% | 3,2% | 2,9% | 2,5% | 2,2% | 1,9% | 1,6% | 1,4% | 0,9% | 0,6% | 0,3% | 0,0% |
| RL-úrslit áðrenn skiftisveiting í % av BTÚ | | | -4,7% | -3,0% | -1,7% | -0,4% | -0,6% | -0,4% | -0,3% | -0,1% | 0,0% | 0,1% | 0,2% | 0,0% | 0,0% | 0,1% | 0,0% |

**Búskapargrunnur Føroya**

| (mió. kr.) | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarogn við ársbyrjan | 1.000 | 950 | 898 | 842 | 784 | 724 | 660 | 593 | 523 | 449 | 371 | 290 | 154 | 62 | 15 |
| Rentuinntøkur (5% p.a.) | 50 | 48 | 45 | 42 | 39 | 36 | 33 | 30 | 26 | 22 | 19 | 14 | 8 | 3 | 1 |
| Privatiseringar | | | | | | | | | | | | | | | |
| Kolvetnisinntøkur | | | | | | | | | | | | | | | |
| Heildarveiting | 600 | 550 | 500 | 450 | 400 | 350 | 300 | 250 | 200 | 150 | 100 | | 0 | 0 | 0 |
| Skiftisveiting til landskassan | -700 | -650 | -600 | -550 | -500 | -450 | -400 | -350 | -300 | -250 | -200 | -150 | -100 | -50 | 0 |
| Fíggjarogn við ársenda | 950 | 898 | 842 | 784 | 724 | 660 | 593 | 523 | 449 | 371 | 290 | 154 | 62 | 15 | 16 |

**Tjóðarúrtøka og landskassaskuld**

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tjóðarúrtøka(BTÚ) | 9.020 | 9.832 | 10.717 | 11.574 | 12.500 | 13.037 | 13.598 | 14.183 | 14.793 | 15.429 | 16.092 | 16.784 | 17.506 | 18.259 | 19.044 | 19.863 |
| **Tjóðarúrtøka, vøkstur nominelt í %** | 10,0% | 9,0% | 9,0% | 8,0% | 8,0% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% |
| Inflatión | 4,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% | 2,0% |
| Tjóðarúrtøka, vøkstur realt í % | 6,0% | 7,0% | 7,0% | 6,0% | 6,0% | 2,3% | 2,3% | 2,3% | 2,3% | 2,3% | 2,3% | 2,3% | 2,3% | 2,3% | 2,3% | 2,3% |
| **Útreiðsluvøkstur í %** | | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% | 4,3% |
| Bruttoskuld við árslok | 4.200 | 3.963 | 3.635 | 3.230 | 2.724 | 2.307 | 1.917 | 1.556 | 1.225 | 926 | 662 | 434 | 283 | 177 | 117 | 108 |
| Bruttoskuld í % av BTÚ (EU-reglur) | 33,3% | 28,1% | 22,7% | 17,5% | 12,2% | 8,5% | 5,3% | 2,5% | 0,2% | -1,8% | -3,3% | -4,6% | -5,2% | -5,6% | -5,7% | -5,5% |

**Fyritreytir:**
Stóri BTÚ-vøksturin seinnu árini heldur á fram til 2005; síðan vøkstur svarandi til _% minni enn søguligur miðalvøkstur
Skatta- og avgjaldsinntøkur 2001-2016: Sami vøkstur sum BTÚ

Innt. grunn: Heildarveiting uppá 600m í 2002, síðan minkandi við 50m árliga fram til 2012
Rakstrarútreiðslur 2001-2016: 2,3 % realvøkstur árliga, 4,3 % um inflatiónin er íroknað.
Løguútreiðslur 2001-2016: 2,3% realvøkstur árliga, 4,3% um inflatiónin er íroknað.

*Høgni Hoydal vísir á, at tað ikki er rætt, tá Kári Petersen sigur, at ongar útrokningar eru gjørdar í sambandi við nýggju sjálvstýrissamtyktina. Hetta eru útrokningarnar, lætnar vórðu uttanlandsnevndini, tá hon viðgjørdi uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks*

# Løgmaður vil samráðast nú

**Anfinn Kallsberg hevur sent Poul Nyrup Rasmussen bræv, har hann skjýtur upp, at teir hittast til samráðingar um sjálvstýrissamtyktina í hesum mánaðinum**

SJÁLVSTÝRIS-SAMTYKTIN
*John Johannessen*

Farast skal nú undir nýggjar samráðingar millum donsku landsstýrið og donsku stjórnina.

Hetta ynskir Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum hevur sent danska forsætisráðharranum bræv við ynski um, at farið verður til samráðingarborið einaferð í endanum av hesum mánaðinum.

### Avtala blokkin í trý ár

Løgmaður ynskir, at samráðst verður um støddina av blokkstuðilinum næstu trý árini, og at framferðarhátturin fyri yvirtøkum verður avtalaður.

Hetta merkir, at løgmaður vil hava ásett støddina av blokkstuðulinum ikki bert fyri sína egnu samgonu, men eisini fyri eina komandi. Eitt ár er eftir av hesum samgonguskeiðnum, men løgmaður skjýtur kortini upp fyri forsætisráðharranum, at gjørd verður ein avtala, ið fevnir um trý ár.

Hesum er føroyska andstøðan hart ímóti. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava fleiri ferðir gjørt greitt, at eftir teirra tykki, eigur landsstýrið ikki at gera avtalu um blokkstuðulin, sum røkkur longri enn samgonguskeiðið út.

### Landsstýrisfólk samráðst um restina

Løgmaður vísir í brævinum til danska forsætisráðharran á, at Løgmansskrivstovan og danska Forsætismálaráðið vara av heimastýrislógini. Og tí heldur hann tað vera náttúrligt, at umsitingarnar hjá hesum báðum stýrum hava ábyrgdina av og samskipa gongdina í yvirtøkunum.

Men løgmaður heldur kortini, at tað eiga at vera føroysku landsstýrismenninir og donsku ráðharrarnir við ábyrgdini fyri einstaku málsøkini, ið samráðast um yvirtøkurnar av einstaku málsøkjunum.

### Fýra bólkar

Anfinn Kallsberg sigur, at ymisku málsøkini eftir hansara uppfatan kunnu býtast upp í fýra bólkar.

Tey í fyrsta bólkinum eru tey, sum standa í lista A í heimastýrislógini, og sum landsstýrið tískil kann yvirtaka uttan samráðingar.

Næsti bólkurin fevnir um tey málsøkini, sum standa á lista B í heimastýrislógini. Hetta eru tey málsøkini, sum krevja samráðingar millum føroyskar og danskar myndugleikar, áðrenn tey verða yvirtikin.

Triði bólkurin fevnir um málsøkini, ið hvørki standa á lista A ella B, men sum kortini kunnu roknast at hava samband við størri málsøki, ið eru nevnd í einum av listinum.

At enda fevnir fjóðri bólkurin um málsøki, ið hvørki standa á lista A ella B, men sum heldur ikki hava samband við onnur størri málsøki.

Tí verða tað málini í triðja og fjóðra bólkinum, ið Anfinn Kallsberg og Poul Nyrup Rasmussen saman við embætisfólkum sínum, skulu finna eina skipan fyri.

Um samráðingar verða í endanum av mai, sum løgmaður skjýtur upp, er enn ikki greitt. Danski forsætisráðharrin hevur enn ikki svarað brævinum frá løgmanni, sum varð sent avstað seinasta fríggjdag.

# Orðaskifti uttan veiggj

**Lítið veiggj var í, tá aðalorðaskifti var um útoyggjapolitikk í løgtininunum mánadagin**

ÚTOYGGJAÁLITIÐ
*John Johannessen*

Tað var fyri einum nærum tómum tingsali, at løgmaður mánadagin tók saman um aðalorðaskiftið um útoyggjaálitið.

Men tað var ikki bert meðan løgmaður røddi, at tingsalurin var nærum tómur. Undir øllum aðalorðaskiftinum um, hvussu útoyggjar skulu bjargast, vóru tað bert framsøgufólkini sjálv og onkur einstakur tingmaður afturat, ið var til staðar. Heldur ikki á tinghúsloftinum sóust fleiri tingfólk enn eini trý fýra onkra løtuna.



*Tingsalurin var nærum tómur mánadagin, tá aðalorðaskifti var um útoyggjaálitið*

*Mynd: John Johannessen*

Sosialurin prátaði við nøkur av tingfólkunum á tinghúsloftinum, ið hóast lítlan áhuga ikki hættaðu sær at fara til hús undir orðaskiftinum. Millum øll teirra var breið semja um, at orsøkin til vantandi áhugan var, at økismenningarálitið, sum snýr seg um næstan júst tað sama, hevur verið til aðalorðaskiftis fyri fáum døgum síðani.

Harafturat hildu tingfólk, at tað líkist ongum at halda aðalorðaskifti um stórmál beint eftir, at álit eru handað og beint áðrenn, at tingið skal til hús fyri summarið og nógv mál skulu avgreiðast í ymisku nevndunum og síðani í tinginum.